# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Grønt ljós fyri eftirskúla í Hvalba

Málið um at byggja eftirskúla í Hvalba hevur verið frammi av og á seinasta árið. Tað hevur fingið ójavna móttøku. Tjóðveldisflokkurin legði uppskot fyri tingið um skúlan, men tað fekst ikki undirtøka fyri tí tá, tó at politikarar úr øllum flokkum hava víst málinum áhuga. Nú bendir so okkurt á, at málið er búgvið til enn eina tingviðgerð og fer at koma fram aftur og hesaferð helst fáa undirtøku í tinginum.

Hví eftirskúla í Føroyum kundi verið spurt! Svarið er rættiliga einfalt. Vit hava ongan slíkan í dag, og tíðin er komin til at fáa ein eftirskúla til tey mongu, ið rætt og slætt verða slept uppá fjall eftir 8.,9. ella 10. flokk í fólkaskúlanum, til tey, sum vilja taka eitt sabbatár á einum øðrvísi skúla, tí tey antin ikki vita, hvat tey vilja og skulu, ella tí tey vilja bíða eitt ár við at fara á miðnámsskúla ella annan hægri skúla.

Í Danmark eru 260 eftirskúlar. Hvørt ár leita millum 100 og 200 føroyingar á donsku eftirskúlarnar. Hetta var so eisini orsøkin til, at nøkur fólk fóru undir at kanna møguleikan at byggja ein eftirskúla í Hvalba. Eftir drúgvt fyrireikingar- og kanningararbeiði hevur arbeiðsbólkur við stuðuli frá bæði Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya gjørt eina spennandi verkætlan at byggja ein eftirskúla í Hvalba.

Tað er altíð gott hjá føroyingum at sleppa av landinum. Hetta gevur nýggjar avbjóðingar og mennir tann einstaka. Men vit eiga sum tjóð eisini at hava møguleika at bjóða okkara ungdómi eftirskúlatilboð í okkara egna landi. Ì einum nýggjum og øðrvísi umhvørvi, enn tey eru von við. Har tey kunnu uppliva og taka til sín tað nógva, sum Føroyar, náttúran og fólkið og lokalumhvørvið hava at bjóða. Tá vit eisini vita, at tað eru mong ung, sum eftir seinasta árið í fólkaskúlanum ella áðrenn tað ganga fyri vág og vind, er tað so eyðsýnt, at tey eiga at hava eitt tilboð um at kunna fara á eftirskúla í sínum egna landi.

Tað ljóðar, at landsstýrið í hesum døgum viðger eftirskúlaætlanina og hevur hug til at leggja hana fram við løgtingið í næstum. Hetta eru góð tíðindi. Nú má og skal eftirskúlaætlanin gerast veruleiki. Latið okkum vóna, at allir flokkar á tingi fara at taka undir við eftirskúlanum í Hvalba og fáa hann á fíggjarlógina komandi. Skulu vit veruliga kunna kalla okkum tjóð við egnum máli og mentan, so mugu vit eisini tryggja, at tey ungu fáa hetta tilboð. At grannalond okkara raðfesta júst eftirskúlan so høgt eigur at siga okkum, at vit eisini mugu til at raðfesta á hesum øki. Betri seint enn ongantíð. Gevið eftirskúlanum í Hvalba grønt ljós.

**Sosialurin**

## Summarfestivalurin fór í luftina - G! Festivalurin fór á heysin og Prixið fór í søguna

FRÍÐÁLVUR JENSEN



*Ein áheitan til ALLAR politisku flokkarnar og valevnini:*

**Vit kunnu ikki hevja tann pástand, at føroyskt tónleika- og mentunarlív hevur tað serliga GOTT – ella?**

Eg fari at senda eina inniliga áheitin til ØLL tey, sum lata seg stilla upp fyri ymsu flokkarnar – kring landið.

Endurtøkur eru, sum eg havi sagt áður, neyðugar, um ein veruliga vil hava hava eitt kjak ígongd, og tí fari eg at royna at seta eitt slíkt ígongd, til tess at gera enn eina roynd, at skapa okkara tónleikarum og føroysku listini betri karmar.

Tað skal, enn einaferð, staðfestast, at tað er alment kent úr øðrum londum, at verða karmarnir víðkaðir fyri mentanini, gevur hetta eina synergieffekt yvir á vinnuliga virksemið, so hvar er veruligi trupulleikin?

Eg kann bara koma við teirri niðurstøðu, at fer mentanin og listin fyri bakka í okkara samfelag, fer hetta at taka nógv við sær í fallinum, og so mugu tit mongu valevnini taka støðu til, um vit kunnu liva við hesum?

**At umstøðurnar hjá festivalunum og Prix´inum er ein ímynd fyri tí hóttafalli okkara tónleikalív er fyri, í løtuni, skal eg ikki taka støðu til, men fær føroyska mentanin ikki størri rúmd í politisku skipanini, kemur hetta at skaða okkara samleika, og fara nógv av okkara listafólkum at missa seg sjálvi, tí fíggjarligu- og fysisku umstøðurnar fara at spenna bein fyri mong av teimum.**

Eg ynski sjálvandi, at bæði Summarfestivalurin og G! Festivalurin koma sær úr truplu støðuni.

Tað er ongin loyna, at byrja vit at tosa um mentan og tónleik, eru tað fleiri, sum yppa øksl og síggja hetta sum ein luksustrupulleika – tað er tað IKKI!

Mong hava sett hesum fólkum spurningin, nær hesi ætla sær at finna sær eitt veruligt arbeiði.

Hetta sigur nakað um, hvussu stutt vit eru komin á leiðini, og tí er neyðugt við eini munadyggari hugburðsbroyting, so vit ØLL byrja at síggja mentanina og listina at vera ein tíðandi part í okkara gerandisdegi.

Gevið mentanini tað – henni tørvar!

Eg vil bara, enn einaferð, senda eina áheitan til politiska myndugleikan um, at skapa tónleikinum og listini so góðar møguleikar, sum gjørligt, so hesi kunnu geva okkum og øllum føroyska samfelganum nakað gott og burðardygt á leiðini.

GOTT VAL ØLL SOMUL!

## Vit hava skyldu at virða okkara umhvørvi

Val



HEINI O. HEINESEN
valevni til fólkatingið
Tjóðveldi

Mítt Hjartamál er: at ríkidømi í havinum verður umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búðskapinum.

Føroyar skulu taka altjóða ábyrgd og ganga á odda í tilfeingisrøkt, so at vit kunnu lata børnum okkara eitt ríkt og livandi umhvørvi.

Øll fólk í heiminum kenna nú avleiðingarnar av ovurnýtslu, dálking og ótamdum útláti í náttúruna. Fyri okkum sum tjóð í Norðuratlantshavi er eitt ríkt umhvørvi og ein skynsom tilfeingisrøkt ikki eitt val, men ein spurningur um at yvirliva.

Tjóðveldi hevur sum høvuðsmál, at ríkidømi í havinum verður umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búðskapinum. Hesin politikkur skal vera lívfrøðliga og búskaparliga sjálvberandi, og skal ígjøgnum lógina skapa tryggar karmar til vinnuna at arbeiða undir.

Tí eiga vit saman við øllum tjóðum kring allan heim at ganga á odda við egnum og altjóða tiltøkum at steðga ovurnýtslu, tálma útláti av veðurlagsgassi og verða fremst í tilfeingisrøkt.

Men eitt ríkt umhvørvi er ikki bert ein spurningur um altjóða avtalur og teknisk mál. Eitt ríkt umhvørvi er eins nógv ein spurningur um okkara umhvørvi í gerandisdegnum, í arbeiðslívinum, á okkara skúlum og stovnum og at kunna liva eitt sunt og heilsugott lív.

**Tjóðveldi fer eisini á fólkatingi**

at virka fyri, at Føroyar verða virknar á altjóða umhvørvisráðstevnuni, sum verður í Keypmannahavn í 2009

at varpa ljós á møguleikarnar fyri orkusparandi verkætlanum í Føroyum

at virka fyri, at Danmark verður við í samstarvinum um at skipa norðurlendskan havgranskingarstovn í Føroyum

**Sosialurin**

__Sosialurin__
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

__Marknaðardeild:__ lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

__Blaðfólk:__
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

__Ítróttur:__
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

__Kykmyndir:__
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

__Sosialurin í Norðoyggjum:__
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

__Sosialurin í Suðuroy:__
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

__!!! Haldarar__
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

__Uppseting/prent:__
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
__Útgevari:__
Sp/f Sosialurin
__Avgreiðsla:__
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
__Postadressa:__
Postboks 76, 110 Tórshavn
__E-mail:__
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

__Lýsingar__

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

__Støddir:__
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

__Innsent tilfar__
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.